# Hvussu grønt er SEV?

Tað var ikki gamalt at gera nakað hóvasták burturúr sær sjálvum og tað var hildið at vera ófrættakent at reypa av egnum verkum.

Soleiðis er tó ikki við elfelagnum SEV. Tað er lítið annað enn sjálvrós og reyp at hoyra frá felagnum. Fyri tíðina er tað tann grøna kósin sum fyllir mest í ársfrágreiðingunum hjá SEV.

> Bæði heima í Føroyum og úti í heimi verður tikið í álvara, at SEV hevur lagt seg á grønu kósina. Nýggja samgongan millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldi og Framsókn staðfesti í samgongu-skjalinum visiónina um, at Føroyar í 2030 skulu vera 100 prosent grønar, tá ið tað snýr seg um orkunýtslu á landi. — *SEV*




"Aksel Johannesen, løgmaður, segði í røðu síni í Norðurlandaráðnum sama dag, sum virðislønin var latin um kvøldið, at Føroyar eru farnar undir eina grøna kollvelting. Samanumtikið staðfestingar og viðurkenning av, at SEV gongur undan, og at felagið er á rættari leið." – *SEV*

Stórt veitsluhald var aftaná at virðislønin varð handað. Har var ein stórsligin pallur við tónleiki, sangi, undirhaldi og nógvum sjálvrósi frá leiðsluni í SEV.

## Tann grøna kósin




"Á myndini sæst, at framleiðslan á oljuriknu verkunum javnt verður niðurlagað, meðan alsamt meira varandi orka verður latin inn á elnetið, til Føroyar hava 100 prosent grøna orku á landi í 2030." – *SEV*

## Tað sum vendir niður vendir upp






Í framrokningini í 2015 sigur SEV at svarta orkan skal verða **javnt niðurlagað**, meðan grøna orkan var á veg upp til 100%. Men, her síggja vit støðuna í 2019. Reyðu pílarnir vísa veruligu gongdina.

Tá alt ikki gongur eftir ætlan, hevur SEV eina undanførslu:

> Óvanliga lítið avfall og vantandi vindur, saman við óhappum og nógvum viðlíkahaldsarbeiði, høvdu við sær metstóra framleiðslu og oljunýtslu á termisku verkunum.
>
> Sundsverkið framleiddi uml. 62,5% av samlaðu elframleiðsluni hjá SEV í fjør [2010] ímóti 45% í 2007, sum er besta árið til varandi orku higartil. Hetta hevði við sær eina metstóra oljunýtslu upp á 35.250 tons.

### **Motororka er ikki loysnin** — *motororkan er trupulleikin*

Flestu vísindafólk eru samd um at tað óvanliga veðurlagið, sum vit uppliva í dag, kemst av at vit brenna ov nógva olju.

Tað hevur tó ikki eydnast SEV at fáa eyguni upp fyri at motorarnir á Sundi og fjarhitin í Havn, hava nakað við veðurlagsbroytingarnar at gera — tvørturímóti. Tess heitari og meira óstøðugt veðurlagið gerst, tess fleiri motorar verða settir upp á Sundi.

### Afturvendandi undanførslur

Tað var ikki bara í 2010 at tað var "óvanliga lítið avfall og vantandi vindur", men tað sama hendi í 2019, har SEV mátti brúka meira olju enn varandi orku.




Tað sum er áhugavert við hesi myndini er, at Eiðisverkið sum framleiddi umleið 14% av samlaðu elframleiðsluni í 2019, einans hevur tvey fólk í arbeiði, nevniliga: Olaf í Garði Joensen (verkmeistari) og Eddu Joensen (reingerð). Hetta stendur at lesa í starvsfólkalistanum hjá SEV.

## Oljuriknu verkini krevja fleiri arbeiðsfólk enn vatnorkuverkini




Í mun til vatnorkuverkini eru motorverkini nógv meira arbeiðs- og viðlíkahaldskrevjandi. Ikki einans er neyðugt at hava fólk til at skifta ella reinsa filtur og mangt annað; tað krevst eisini ein munagóð administratión til at keypa inn eykalutir, smyrjolju, rustloysara, ráolju o.m.a.

## Mest einfalda framleiðsla av elorku




(1) Vatngoymsla (2) Byrging, gjørd úr tilfari á staðnum, (3) Rør, (4) Turbina, (5) Elorka. Vatngoymslan og byrgingin hava eina livitíð uppá 100 ár, ella longri, meðan rør og turbina kunnu vara eini 50 ár.




Tekning: Óli Petersen




Cecilia W. Eysturdal, lærlingur, og Elisabet Dalsgaard, maskinmeistari

Meðan dygdin og prísurin á olju sveiggjar nógv, so er dygdin og prísurin á vatni rættiliga støðugur. Tey seinastu eitt hundrað árini hevur tonsið av vatni kostað 0,00 kr. Tað er heldur onki punktgjald, innflutningsgjald ella meirvirðisgjald á vatni. Vatnorkuverk hava eisini tann fyrimun, at tey kunnu traðka til beinanvegin, tá brek eru á motorverkunum ella vindmyllunum – tað er bara at opna fyri vatninum (A).



"SEV kýtir seg at geva starvsfólkum eina góða byrjan, so at fólk kenna seg væl." sigur SEV. Men, myndin (B) vísir at SEV hevur ein avslappaðan hugburð til trygdina hjá arbeiðsfólkinum. Kvinnurnar á myndini hava hvørki trygdarhjálm ella -brillur, tíansheldur nakra aðra trygdar- ella verjuútgerð. Hvat ger deildin hjá SEV sum tekur sær av heilsu-, trygdar- og umhvørvisviðurskiftum? Og hvar er Arbeiðseftirlitið?

# A love story?

Tað tók ikki langa tíð eftir at SEV flutti til Havnar at Tórshavnar Kommuna og SEV stovnaðu eitt hitafelag.

Søgan um Fjarhitafelagið byrjar í 1988, undir navninum Hitafelagið. Felagið stríddist fyri tað mesta við ónøgdar kundar og stóra skuld. Í 1994, tá skuldin hjá felagnum var vorðin so stór at tað ikki orkaði meira, fór felagið á húsagang og landið, ið veðhelt, misti 64 mió. kr.

Torført var at selja trotabúgvið, tí meginparturin av materiellu støðisognini var grivin niður í gøtunum í Havn. Tað endaði við at fyrrverandi eigararnir stovnaðu eitt nýtt felag og fingu ognirnar aftur fyri 187.600 kr. Tað nýggja felagið fekk navnið Fjarhitafelagið.

Tú kundi freistast til at hugsa, at tá allir føroyingar høvdu stuðla fjarhitanum til Havnar við 64 mió. kr., so fór at verða friður. Men so var ikki.

Justinus Eidesgaard, rithøvundur, skrivar í 2018:

> Hvussu ber tað til, at øll tey, sum eru tvungin upp í fjarhitaskipanina í Havn skulu rinda meira enn tað kostar at fýra við olju? Kann tað einki hava at gera við, at íløgurnar til fjarhitan samsvara als ikki við tað vit fáa burtur úr? Eg kundi hugsað mær at sett eina grøna hitapumpuskipan upp hjá okkum í Hoyvík, men eg eri tvangsinnlagdur í fjarhitaskipanina og havi neyvan loyvi at gera hesa íløgu.

Hann leggur afturat:

> Fjarhitafelagið er ein fyritøka, sum er bygd eftir betongkommunistiskum leisti, har brúkarin onga ávirkan hevur á kostnaðin. Eg havi nú verið kundi í 18 ár og eg havi onga ávirkan á prísleguna. Tað sær út til, at eg skal tiga og góðtaka og vera við at útbyggja fjarhitaskipanina og hóast tað eftir vanligum marknaðarbúskaparligum reglum átti at verið soleiðis, at tess fleiri kundar, tess betri og bíligari átti raksturin av fjarhitastøðini verið.




Tað er ikki torført at síggja at fjarhitaskipanin, sum enn ikki er fult útbygd, er ein dýr loysn. Bara høvuðsleiðingin til og frá Havnini er 21,4 km long. Tað skulu stórar pumpur og nógv orka til at trýsta heita vatnið gjøgnum rørini og inn í hvørt hús í Havnini, fyri ikki at tala um hitatapið í allari skipanini. Men, tá øll orka á landi verður grøn í 2030, verður ikki brúk fyri fjarhitanum. Havnarfólk hava tá frælsi at fáa sær hitapumpur.

# Størri svartar íløgur enn nakrantíð

> **Grønt fyri framman** Tað er hugaligt at taka samanum og kunna staðfesta, at vit eru á rættari kós. Tað er grønt fyri framman, og dagsskráin er fjølbroytt. — *SEV 2015*

**GRØNA ELORKAN • INN Í GRØNU FRAMTÍÐINA GRØNARI OG BÍLIGARI • VIT SETA FERÐ Á GRØNU ÚTBYGGINGARNAR • GRØNAR ORKUKELDUR EIN GRØN HITALOYSN • ONNUR GRØN ÁTØK 100 PROSENT GRØNA ELORKU Á LANDI Í FØROYUM Í 2030 • GRØNI VEÐURLAGSGRUNNURIN GRØNA KÓSIN Í SPINNARÍNUM • GRØNA GONGDA LEIÐIN • TAÐ GRØNA UNDIRSTØÐIÐ • VIÐ GRØNUM HITA • HESAR GRØNU ORKULOYSNIRNAR • EIN GRØN FRAMTÍÐ VIÐ ONGARI OLJU • GRØNUR ROKNSKAPUR**

Hóast nógv **grønt tos**, so hevur SEV ongantíð gjørt so stórar íløgur í **svarta orku** sum í dag.

### SEV hevði ætlanir um at hátíðarhalda svartari orku

Nýggjasta risa íløgan hjá SEV var Støð 3 á Sundi. Verkætlanin tók bert 3 ár eftir at fyrsta skotið bleiv latið av. Hetta er óvanliga skjótt, serliga tá hugsa verður um hvussu langa tíð grønar útbyggingar taka. Seinasta vatnorkuútbyggingin hjá SEV var Eiðisverkið. Tann verkætlanin tók 30 ár.

Eingin ivi er um at SEV kann arbeiða skjótt tá tað ræður um svarta orku.




"Stóra verkætlanin við Støð 3 á Sundsverkinum er at enda komin. Arbeiðið hevur gingið væl, og ætlanin var at hátíðarhalda yvirtøkuna við stórum almennum tiltaki tann 29. apríl í ár, men støðan við Koronu loyvdi ikki hesum. Samlaði kostnaðurin er uppgjørdur til 758 mió. kr." – *SEV í november 2020*

Hvussu nógvar veitslur skulu haldast fyri einum motorverki?



SEV hevði eitt reisigildi hósdagin 16. mai 2019 á Støð 3.

> Støð 3 er partur av arbeiðnum at tryggja reint og trygt Sundsverk, sum byggir brúgv ímillum eina farandi tíð við oljunýtslu og eina grøna framtíð við ongari olju. — *SEV*

Can you repeat that, sir?



### Tann svarti arvurin

Meðan restin av Føroyum bygdu vatnorkuverk, hevur Havnin, tey seinastu eitt hundrað árini, brúkt motorverk til framleiðslu av elorku.




(1) Motorverkið á Rundingi [1921] – (2) Motorverkið í Gundadali [1950] –
(3) Motorverkini á Sundi: Støð 1 [1975], Støð 2 [1983] og Støð 3 [2020]

## Elektriskan streym í eitt hundrað ár

Í ár eru 100 ár liðin síðan Føroyar fingu elektriskan streym.

> Ravmagnið er helst tann uppfinningin, sum hevur havt við sær størstu framgongd og flest broytingar kring heimin. — *Jóan Pauli Joensen, professari*




Tann 1. september í ár eru 100 ár síðan motorverkið úti á Rundingi fór at veita streym til Havnina. Síðan tá hava fleiri túsund tons av sóti og vakstrarhúsgassi verið pumpað út í umhvørvið í miðstaðarøkinum.

Við tað at hátíðarhaldið í samband við Støð 3 var avlýst, er 1. september í ár eitt gott høvi hjá SEV og oljufeløgunum í Havn, at hátíðarhalda útbyggingarnar av termiskari orku í Føroyum tey seinastu 100 árini.

## Mótvekt til $CO_2$ útlátið

Sum gongdin í elframleiðsluni er í løtuni, fer tað at ganga long tíð til SEV hevur vant seg av við oljuriknu verkini. Um tað var nakar áhugi fyri at verja umhvørvið, so kundi SEV roynt at tikið stig til onkra mótvekt til $CO_2$ útlátið, ella *carbon offsetting,*[1] sum tað verður rópt.




Um SEV plantaði eitt træ fyri hvørji 20 føt av olju sum verða brend, so svarar tað til umleið 10.000 trø um árið.

[1] **Carbon offsetting** is the process which allows individuals and companies to invest in environmental projects around the world in order to balance out their own carbon footprint. This comes in various forms, including soaking up $CO_2$ from the air through the planting of trees.

Tað kostar umleið eina hálva mió. kr. at keypa og planta 10.000 trø og runnar. Tað er ein lítil prísur, samanborið við tær 140 mió. kr. sum SEV brennir av olju á hvørjum ári.




Trees in the Faroe Islands are rare, but they do exist. In the late 1800s, groves were planted in some places – *Viðarlundin í Kunoy* in 1914. Large variety of trees, located above the village – ashes, spruces, birches, with *Eggjarsteinur*, a giant rock, at the center. Picnic table, trails and bubbling brook; a pleasure ground just big enough to make you feel like being deep in the woods. – *Anja Mazuhn*

## Raðfestingin hjá SEV

**No. 1: Nærumhvørvið** Tað er altumráðandi fyri leiðsluna í SEV at hava eitt gott forhold til nærumhvørvið. Tað kann t.d. gerast við at íbúgvarnir í høvuðsstaðnum fáa bíligan avlopshita frá motorverkinum á Sundi. Eitt annað hjartamál er at skrivstovan á Landavegnum skal — til eina og hvørja tíð — síggja gott út, soleiðis at fólk føla seg heima.




"Í fjør summar byrjaði umvælingararbeiðið av skrivstovubygninginum á Landavegi 92, sum eisini fevnir um eina dagføring, soleiðis at bygningurin lýkur nýggjastu krøvini. Tekjan, vindeygu og klædningur verða skift, og nýggjur høvuðsdurur verður eisini gjørdur við góðari kundamóttøku, samstundis sum bygningurin verður dagførdur innan. Hetta er samlað mett at kosta 29,9 milliónir krónur, og arbeiðið verður væntandi liðugt í heyst. Sólpanelskipan, fjarhitaskipan og neyðstreyms-veiting skulu ætlandi eisini gerast, tann kostnaðurin er ikki við í nevndu meting." – *SEV 2019*

# Bygningurin á Landavegnum er frá 1988 og SEV keypti hann í 1991 fyri 27 mió. kr.



SEV ÁRSFRÁGREIÐING 2006

Tey 30 árini SEV hevur húsast úti á Landavegnum, hevur bygningurin verið væl brúktur til fremmandavitjanir, hátíðarhald, tiltøk, hugnaløtur, sosialar samverður og annað. Tað er tí ikki at undrast á at bygningurin krevur eina grundleggjandi yvirháling. Tú kanst siga hvat tú vilt um SEV, men tað er á einum øki at SEV skarar framúr, og tað er at skipa fyri tiltøkum. Tað er bara ein alheimsfarsótt sum kann steðga SEV, tá tað ræður um at hátíðarhalda eitt ella annað.

# Niðast í raðfestingini hjá SEV eru vatnorkuverkini




Umhvørvið við Eiðisvatn

"SEV raðfestir umhvørvið høgt," sigur Annika Flagstad Berg, leiðari á heilsu-, trygdar- og umhvørvis-deildini hjá SEV í Havn. "SEV hevur sett sær sum mál støðugt at fremja ábøtur á umhvørvisøkinum. At fokus verður sett á umhvørvið og hetta at rudda og fríðka um, er eisini í tráð við HTU-politikkin og virðisgrundarlagið hjá SEV." sigur hon. Men, myndin omanfyri sigur nakað annað.



Nevndin í Føroya Náttúru- og Umhvørvisfelag

Tað er alt sum bendir á at tað gamla ættarliðið ikki er ført fyri at gera nakað ítøkiligt við umhvørvisavbjóðingarnar. Tí er tað bæði gott og gleðiligt at vita, at FNU hevur fingið nýggjar kreftir við endamálinum: *"at vekja ans og kenslur manna millum fyri vakurleikanum í óspiltari náttúru og umhvørvi."*

# Tað er stórur munur á umhvørvinum við Eiðisvatn og á Landavegnum




SEV HQ á Landavegnum

Uttanfyri høvuðsskrivstovuna hjá SEV eru ongir arbeiðsskúrar ella útgerð. Pelton turbinuhjólið (fremst í myndini) tók SEV við sær úr Vestmanna. Rennihjólið er eitt symbol uppá reina og varandi orku.

## Total control




Útjaðarakommunurnar Landavegur 92

Kontrolrúmið, sum lá eftir á Fossáverkinum tá SEV fór til Havnar, er nú eisini flutt út á Landavegin í Havn. Hetta hendi í fjørheyst. Leiðslan í SEV kundi ikki longur hava álit á bygdafólkum ið framleiða elorku úr vatni.

## Hydrophobia




Hákun Djurhuus, stjóri í SEV, er altíð tilreiðar at hitta fremmandafólki við einum brosi. Men, hann er týðiliga uttanfyri sína *comfort zone* tá Sjónvarpið spyr hann um eina pumpuskipan í Suðuroy.




Tað er vælkent millum verkfrøðingar, ið arbeiða hjá SEV, at vatnorkan ikki verður brúk optimalt, tí tað liggja altíð umleið 8 milliónir tons av vatni á goymslu, sum ongantíð verða brúkt. Á myndini omanfyri sæst yvirflóðin á Eiðisvatni.  Yvirfalsrásin (*the spillway*) er ein týðandi partur av einumhvørjum vatnorkuverki. Tað er tó ongin loyna, at tað er alt ov ofta at vatngoymslurnar hjá SEV flóta yvir. Orsøkin er, at SEV ikki brúkar vatnorkuna soleiðis, at hon gevur størst møguligt búskaparligt avkast.




Í bakgrundini sæst rokið frá yvirflóðini, sum fer beinleiðis í havið, meðan turbinurnar standa stillar. Kaðalrullur o.a. liggur og sløðis uttanfyri turbinuhúsið og á grótkastinum. Hetta er tilfar sum annaðhvørt skuldi verið goymt innandura ella burturbeint, heldur enn at liggja sum ein umhvørvis skamblettur.







Meðan órudd og líkasæla eyðkenna vatnorkuna í Føroyum, so eru vatnorkuverk, aðrastaðni í Evropa, inspiratión til nýskapandi virksemi, so sum málninga- og høggmyndalist. *Málningur: Albania / Mynd: Sveis*

## Føroysku elprísirnir millum teir hægstu í Evropa

Tað eru fleiri orsøkir til at eitt land — við ótømandi grønari orku — hevur so høgar elprísir:

- SEV brúkar 60% av dýrari olju og bert 40% av grønari orku til elframleiðsluna;
- Ein bólgna og tung fyrisiting:




Talið av starvsfólkum í fyrisitingini hjá SEV er í vøkstri. Sambært SEV starvast í dag 34 fólk (21%) í fyrisitingini. Millum tey 34 fólkini eru tveir skjalavørðar (Óluva og Eyðun Waagstein).

Fyri eitt framleiðsluvirki sum SEV, átti fyrisitingin ikki at verið meira enn 10% av arbeiðsmegini.

Um SEV var talgildað, var ikki neyðugt við skjalavørðum og einari stórari fyrisiting.

Høvuðsuppgávan hjá SEV er at framleiða elektrisitet, heldur enn skjøl.

- Fjarhitafelagið er eitt haft um beinini hjá SEV. SEV er eitt elfelag og átti at miðsavna kreftirnar til elframleiðsluna. Um SEV seldi sín part í Fjarhitafelagnum, vóru fleiri pengar til íløgur í pumpuskipanir.
- Í staðin fyri at umvæla bygningin á Landavegnum fyri 29,9 mió. kr., átti SEV at selt húsini. Bygningin á Landavegnum er vælegnaður til museum og/ella skjalasavn.

  Ein nýggjur og tíðarhóskandi bygningur átti at verið bygdur, til eina lætta og smidliga fyrisiting. Við tað at allar kommunurnar í Føroyum eiga SEV, kann høvuðsskrivstovan líka so gott liggja í Vestmanna ella Suðuroy, har tørvurin á hátíðarhaldum ikki er so átrokandi sum í Havn.

# Grøn elorka í 100 ár

Sunnudagin 18. juli í ár eru 100 ár liðin síðan vatnorkuverkið í Botni, sum tað fyrsta í Føroyum, fór at framleiða grøna elorku.




Umstøðurnar og amboðini vóru ikki tey somu í 1921, sum tey eru í dag. Men, tað forðaði ikki undangongufólkunum í Vági, at gjøgnumføra teirra hugsjónir um varandi orku, til teirra samtíð og komandi ættarlig.

Poul A Mikladal
18. januar 2021
mikladal@yahoo.com